Kommunufelagið

Fíggjarmálaráðið og
Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting
16. mars 2023

Okkara j.nr.
22/0

Málsviðgeri
HKV

Tygara j.nr.

Viðv.: Broyting í tøkugjaldi og veiðigjøldum

Sum tað verður greitt frá í báðum uppskotunum, hava bæði tøkugjaldið og veiðigjøldini eina beinleiðis fíggjarliga ávirkan á kommunurnar.

Tað er soleiðis, at hvørja ferð landið tekur 100 kr. inn í tøkugjaldi, missa kommunurnar 5,40 kr. í partafelagsskatti. Seinastu árini hevur landið tikið inn umleið 240 mió. kr. árliga. Tað vil siga, at kommunurnar missa umleið 13 mió. kr. árliga vegna tøkugjaldið.

Tá tað kemur til avgjøldini á fiskatilfeingi (veiðigjøld og uppboðsølu), missa kommunurnar uppaftur meira. Mett verður, at hvørja ferð landið tekur 100 kr. inn í avgjaldi frá fiskivinnuni, missa kommunurnar 5 kr. í lønarskatti og 4 kr. í felagsskatti, tað vil siga 9 kr. til samans. Seinastu árini hevur landið tikið inn umleið 350 mió. kr. árliga. Tað vil siga, at kommunurnar missa umleið 32 mió. kr. árliga vegna veiðigjøldini.

Samanumtikið kann staðfestast, at kommunurnar seinastu árini hava mist umleið 45 mió. kr. árliga vegna gjøld á ali- og fiskivinnuna. Við teimum hækkingum, ið nú eru í umbúna, verður hesin missur uppaftur størri komandi árini.

Kommunurnar fegnast um, at nýggja landsstýrið ætlar at lata kommununum ein part av tøkugjaldinum, men Kommunufelagið mælir til eina greiðari og einfaldari loysn, har bæði uppskotini verða broytt soleiðis, at kommunurnar altíð verða fíggjarliga skaðaleysar av gjøldunum. Hetta kann gerast við at áseta, at kommunurnar fáa 5,4 % av tøkugjaldinum og 9 % av veiðigjøldunum. Samanlagt kostar henda loysnin landinum tað sama sum ætlan landsstýrisins viðvíkjandi tøkugjaldinum.

At enda minnir Kommunufelagið enn einaferð á, at kommunurnar veita alt tað undirstøðukervi, sum yvirhøvur ger tað møguligt at reka fiski- og alivinnu í Føroyum. Samanlagt er talan um íløgur fyri milliardir av krónum. Tí er tað ikki annað enn eitt rímiligt krav, at kommunurnar í minsta lagi verða hildnar skaðaleysar í sambandi við, at landið áleggur hesum vinnum gjøld.

Vegna
Kommunufelagið

Tórbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo